# Suðurpólur á Tvøroyri

**Hetta til valið hava tjóðveldisfólk nógv tiltøk í Suðurpólinum á Tvøroyri, sum er beint yvirav grillvoginum. Tiltøkini eru almenn og tað er ikki bara politikkur á skránni**

VALSTRÍÐ
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað hevur vundið meiri og meiri uppá seg at teir ymsu politiskur flokkarnir finna sær høli, har teir skipa fyri tiltøkum og royna at savna fólk sum eitt lið í valstríðnum.

Til hetta valið hava tjóðveldisfólk í Suðuroy fingið sær høli á Tvøroyri, sum tey nevna Suðurpólunum við ávísing til Norðpólin, sum er hølið hjá tjóðveldisflokkinum á Gamla Apoteki í Havn.

Suðurpólurin er beint yvirav grillvognum á Tvøroyri og har verða ymisk tiltøk á skránni.

Í kvøld verður politiskt kjak, har allir flokkar verða umboðaðir. Men ætlanin er ikki, at tað vera valevnini, sum skulu føra orðið, men onnur umboð fyri flokkarnar. Tó eru valevni eisini vælkomin at leggja uppí kjakið, tá ið hini hava sagt sítt.

Leygarkvøldið vísir Leivur Nygaard gamlar myndir og greiðir frá og mánakvøldið eru valevnini hjá tjóðveldisflokkinum í Suðuroy at hitta.

Týskvøldið heldur Dennis Holm frá økisgranskingardeplinum fyrilestur um kommunusamanlegging og um økismenning og hóskvøldið fer Tórbjørn Jacobsen at hitta suðuroyingar.

Næstan leygarkvøld fara vísusangararnir Birgir og Jònsvein frá Gjógv at syngja.

Suðurpólurin letur upp klokkan sjey og tiltøkini byrja klokkan átta.

Sunnukvøldið, mikukvøldið og fríggjakvøldið 16. januar, er stongt, annars er opið hvørt kvøld.

# Fiskavirking letur ikki virkið á Tvøroyri aftur

**– Vit hava byggja virkið á Tvøroyri út fyri tíggjutals milliónir og tað gera vit ikki við eitt virkið, sum ætlanin er at lata aftur, sigur leiðarin á Fiskavirking á Tvøroyri**

FISKAVIRKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Bjarni Hansen, virkisleiðari á Fiskavirking á Tvøroyri, greiðir livandi frá nýggja frystaranum, sum í løtuni verður settur upp á virkinum. Tað er bara sjúkrahúsið, sum betalir meiri í lønum enn Fiskavirirking á Tvøroyri, so virkið hevur havt ómetaligan týudning fyri suðuroyingar, sigur hann*

– Hatta má vera okkurt slag av valagni.

Bjarni Hansen, virkisleiðari hjá Fiskavirking á Tvøroyri skilir lítið og onki av tí, sum John Nielsen, leiðari á Fiskamarknaði Føroya, førir fram í Sosialinum mikudagin um Fiskavirking á Tvøroyri.

– Orsøkin kann bara bera tann, at John Nielsen er farin at royna at styrkja seg uppundir valið, nú hann er uppstillaður fyri miðflokkin, tí tað man heldur verða politikarin John Nielsen sum tosar, framum vinnulívsmannin.

– Men so skuldi hann kortini hildið seg verið ov góðan til at borðreitt fyri suðuroyingum við beinleiðis ósannindum og leysum uppáhaldum um Føroya Fiskavirking á Tvøroyri, leggur Bjarni Hansen afturat.

Hann sigur, at tað er nevniliga onki í tí, sum John Nielsen førir fram um, at virkið á Tvøroyri bara er ein kleppur um beinið á Fiskavirking tí tað er so fjarskotið og at Fiskavirking alla tíðina minkar um virksemið á Tvøroyri.

John Nielsen førdi fram, at virkið á Tvøroyri hóskaði ikki saman við restini av Fiskavirking og at virksemið á Tvøroyri nú er bara ein viðfáningur av tí, sum tað hevur verið.

– Veruleikin er, at av øllum virkjunum hjá Fiskavirking, er virkið á Tvøroyri tað virkið, har virksemið er størst og sum tískil eisini betalir mest í lønum til arbeiðsfólk.

– Veruleikin er eisini, at aftaná Sjúkrahúsið, er Fiskavirking tað virkið í Suðuroy, sum betalir mest í lønum. So tann týdningurin, sum virkið hevur havt fyri Suðuroynna, skal ikki undirmetast, tí hann hevur verið stórur hesi árini, Fiskavirking hevur verið til.

Bjarni Hansen sigur, at í fjør var arbeiðið á virkinum á Tvøroyri til umleið 100 fólk og gott tað, at kalla hvønn einasta dag, uttan sjálvandi í verkfallinum og einum øðrum lítlan steðgi upp á hálvaaðru viku í sambandi við útbyggingar, og so onkran hendinga dag afturat.

– Og at kalla virkið á Tvøroyri fyri ein klepp um beinið á Fiskavirking, haldi eg í grundini er ein niðurgerðing av okkara arbeiðsfólki, sum hvønn dag leggur alla sína orku í fyritøkuna, skoytir hann upp í.

## Útbygt fyri tíggjutals milliónir

Bjarni Hansen sigur, at hesi seinastu árini hevur Fiskavirking bygt virkið á Tvøroyri út fyri tíggjutals milliónir, bæði innan og uttan.

Eitt nú er allur bygningurin klæddur av nýggjum, umframt at nýggj útgerð og arbeiðstól eru keypt, bæði trukkar, flakamaskinur, kongafiskalinjur, rávøruskiljari og aðrar maskinur.

Og í løtuni verður nýggjur frystari settur upp so at møguleiki verður fyri at gera meiri við vøruna, eitt nú at pakka fiskastykki í smáum. Samstundis er eisini ætlanin at byggja virkið nakað væl størri enn tað er í dag, eins og nýggjar linjur til reinskering eisini koma í næstum.

– Og tað sigur seg sjálvt, at so stórar íløgur ger ein fyritøka ikki í eitt virki, sum ætlanin er at lata aftur.

Virkisleiðarin á Tvøroyri sigur, at hetta vísir tvørturímóti, at Fiskavirking raðfestir virkið á Tvøroyri rættiliga høgt.

Hann vil ikki siga, hvussu nógvum tonsum, virkið á Tvøroyri hevur tikið ímóti.

– Tonsatalið sigur ikki so nógv. Tað, sum er avgerandi, er, hvussu nógv fiskurin, sum kemur á virkið, verður virkaður og her tala lønarútreiðslurnar fyri seg, sigur Bjarni Hansen.

Uppáhaldið frá John Nielsen um at virkið á Tvøroyri gevur hall, hevur virkisleiðarin heldur onga viðmerking til, tí hann vil ikki siga nakað um roknskapartøl.

– Men tað er við virkinum á Tvøroyri sum við øllum øðrum, at tað gongur upp og niður. Men tað at Fiskavirking ger so stórar íløgur í virkið merkir sjálvsagt, at hetta er sanniliga eitt virkið, sum ætlanin er varðveita.

Hann heldur eisini, at Fiskavirking hevur dugað væl at umsitið tað fíggjarligu innspræning, tað hevur fingið frá tí almenna og nú fær Fiskavirking ongan stuðul.

– Tað er í veruleikanum meiri enn tað ber til at siga um fyritøkuna, sum John Nielsen er stjóri á, tí Fiskamarknaðurin er einasta fyritøka í landinum, sum fær lógarfestan stuðul.

– Tað fær Fiskamarknaðurin við tað, at ein løgtingslóg sigur, at hvørt skip skal selja minst 30 % av veiðini um uppboðssøluna, sigur Bjarni Hansen.

### Tøl um Fiskavirking

**Betala yvir 20 milliónir í lønum**

Hesi seinastu árini hava lønarútreiðslurnar hjá Føroya Fiskavirking á Tvøroyri verið hesar:

1999: 16 milliónir krónur
2000: 18 milliónir krónur
2001: 21,4 milliónir krónur
2002: 23,1 milliónir krónur.
Lønarútreiðslurnar fyri 2003 eru ikki gjørar upp enn, men tær eru ikki lægri enn í 2002, hóast verkfall legði virkið lamið í fleiri vikur.

Bjarni Hansen sigur, at hóast sáttmálalønirnar eru hækkaðar nokk so fitt hesi fýra árini, er vøksturin í lønarútreiðslunum størri enn so og hetta vísir, at virksemið hjá Fiskavirking á Tvøroyri hevur verið veksandi hesi seinastu árini og ikki minkandi, sum John Nielsen førir fram.



*Í næstum er eisini ætlanin at byggja virkið úr vestureftir. Virkið, sum nú er , gongur til áleið har, sum trukkurin stendur, við tað innaru hurðinum. Alt, sum er frammanfyri, er uppíbyggingin, har kølirúm skal vera*

*Eftirgjørd mynd: Leivur Nygaard*



# Uppgávur um tøl

**Skúlabókagrunnunin hevur givið út uppgávuhefti til Bókhald og ársroknskap og Kostnaðarlæru**

ÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*



*Tvey nýggj uppgávuheftir til lærugreinina, virkisbúskapur B, eru júst komin út*

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út tvey uppgávuhefti eftir Olav Absalonsen til bøkurnar Bókhald og ársroknskap og Kostnaðarlæru. Heftini eru partur av røðini í virkisbúskapi, sum er ætlað til undirvísing í handilsskúla og øðrum miðnámsskúlum, men eisini til sjálvlestur. Tvær aðrar bøkur eru í røðini. Tær eru Virkið og Fyriskipan eftir Heðin Samuelsen. Uppgávuhefti til tær útgávurnar koma fyrst í hesum árinum.

Bókhald og ársroknskapur er ætlað til lærugreinina virkisbúskap stig B í hægri handilsútbúgving og í Fiskivinnuskúlanum. Innihaldið er skipað soleiðis, at tað gevur lesaranum natúrliga framgongd í lærugreinini. Uppgávurnar fylgja kapitlunum í bókini.

Kostnaðarlæra er somuleiðis ætlað til nýtslu í handilsskúla og øðrum miðnámsskúlum. Í handilsskúlanum er hon ætlað til undirvísing í virkisbúskapi í hægri handilsútbúgving. Innihaldið í bókini er í høvuðsheitum fastur og broytiligur kostnaður, inntøka, marknaður og kostnaðarbýti.

Uppgávuheftið til Bókhald og ársroknskap er 52 síður og kostar 68 krónur. Uppgávuheftið til Kostnaðarlæru er 30 síður og kostar 48 krónur.

# So er at skriva

**Næsta málllærubókin í røðini, Eg skrivi, er júst givin út**

ÚTGÁVA
*Tíðindaskriv*



*Eg skrivi 2 saman við Útfyllingarfyrisøgnum løgdum hjá útgávuni kostar 68 krónur*

Føroya Skúlabókagrunnur hevur givið út Eg skrivi 2 eftir Gunnvá Dam, lærara, sum er skrivligt føroyskt til miðdeild fólkaskúlans. Hetta er onnur bókin í eini røð av málllærubókum við skrivligum uppgávum til miðdeild fólkaskúlans. Eg skrivi 1 kom út í summar. Málllæruheftini kunnu nýtast úr 4. flokki upp í 7. flokk, so sum lærarin heldur vera hóskandi.

Í hesari bókarøðini eru málllæruuppgávur, fyrisagnir, uppgávur til fyrisagnir, aftursagnir og ymiskar stuttligar uppgávur. Fyrisagnirnar eru eisini gjørdar sum innskrivingarfyrisagnir á ymiskum torleikastigi og eru í einum serstøkum hefti lagdar hjá útgávuni.

Vegleiðing er skrivað í hvørjari bókini sær. Í vegleiðingini verður greitt frá, hvussu høvundurin hugsar sær, at arbeiðast kann við teimum ymisku síðunum. Endamálið við EG SKRIVI-heftunum er at stuðla og eggja næmingunum til at kunna seg væl og virðiliga um tað føroyska málið, so tað fellur teimum lætt og raðið at orðbera seg á góðum og tíðarbærum máli, bæði í talu og í skrift.

Eg skrivi 2 eftir Gunnvá Dam hevur Edward Fuglø myndprýtt. Hestprent hevur havt umbróting, reproarbeiði og prentumsiting um hendur. Kápuuppsetingina hevur Grafik Studio staðið fyri.

ÚTSØLA
NOA NOA®
TONE BARKER
ALT
1/2
PRÍSUR
Byrjar fríggjadagin
9. januar kl. 08.00
Opið er
til kl. 20.00
29
Í Tróndargøtu
tel 318200 • 218199